# Keyp fyri 20.000 krónur í Miklagarði í SMS

**Til handils í Miklagarð við 20.000 krónum**

Í SMS – Føroya størsta sølustaðið – liggur eisini Føroya størsti matvøruhandil. Miklagarður hevur landsins størsta útboð av øllum hugandi matvørum og øðrum vørum – alt frá frukt, grønmeti, kjøti og kryddi til drykkjuvørur, pálegg og góðgæti, og her handlað nógv hundrað fólk hvønn dag.

Í jólakappingini hjá Sosialinum sleppur tú í Miklagarð at brúka 20.000 krónur til títt innkeyp.

– Tað, sum ger Miklagarð til nakað serligt, er tað stóra útboðið av vørum. Vit hava nógvar vørur at velja ímillum í øllum vørubólkum, sigur Johnny Priese, sum er leiðari fyri handilin.

Slaktarin í Miklagarði dregur eisini nógv fólk til handilin við sínum fjølbroyttu og lokkandi vørum.



Tað er altíð lív í Miklagarði, men jólamánaðin er ein serliga lívlig tíð í Miklagarði, tí tá fara nógv fleiri fólk enn vanligt til handils, og tey keypa eisini meira enn vanligt.

– Jólini eru merkt av traditiónum, og soleiðis skal tað eisini vera. Tá hava vit nógvar vørur, sum hoyra jólunum til, at selja. Tað skal helst ikki henda ov nógv nýtt í jólamánaðinum, tí vit skulu hava tað, sum vit plaga at hava, og sum fólk vilja hava í desember, sigur Johnny Priese.

Umleið 75 fólk arbeiða í Miklagarði.

# Lalandia – eitt paradís fyri familjuna

**Familjuferð fyri 2 vaksin og 2 børn til Lalandia**

**Ein av stóru vinningunum í jólakappingin hjá Sosialinum er ein ferð til Danmarkar við uppihaldi á Lalandia feriustaðnum. Atlantsflog flýgur familjuna til Danmarkar, og síðani ber til at hugna sær í best umtókta feriustaðnum í Danmark – eitt paradís fyri familjuna**



Lalandia er eitt stað, har ongum nýtist at keða seg. Frítíðarstaðið bjóðar stórum og smáum, ungum og gomlum stuttlig feriuupplivilsi. Lalandia liggur í Rødby á Lollandi, og har eru 25.000 fermetrar av øllum hugsandi aktivitetum undir taki.

Í summar varð júst hesin parturin av feriustaðnum víðkaður, og sjálvur mentamálaráðharrin Brian Mikkelsen var til staðar, tá ið umbygdi aktivitetsdepilin undir taki lat upp.

Í útbyggingini vóru millum annað nýtt risastórt spæliland, nýggj skoytuhøll, nýggj café, størri bowlinghøll og fleiri matstøð.

Aktivitetir eru til øll, og sum búgvandi gestir fáa øll atgongd til baðiland, fleiri spælipláss, matarstøð, undirhald, ítróttarøki og mangt annað.

Í baðilandinum eru millum annað 250 m av skreiðibreytum, aldur, gosbað, hitarúm, stórir og smáir hyljar umframt fleiri spælipláss. Monky Tonky land við hópin av tilboðum til børn, dvørgageitum og so framvegis setir eisini dám á lívið í Lalandia.

Gist verður í smáum húsum við øllum hentleikum, og síðani ber til at uppliva alt, sum upplivast kann.

Lalandia er við nýggju útbyggingini blivið størsta feriustað av sínum slagi í Norðurlondum. Gestirnir koma serliga úr Danmark og Svøríki, men eisini nógvir føroyingar hava havt sítt lív feriuupplivilsi í Lalandia.

Nú fært tú kjansin at vinna eitt uppihald í Lalandia, og vilt tú stytta tær um myrku vetrardagarnar við upplivilsum á Lalandia, kanst tú byrja við at vitja heimasíðuna hjá teimum – www. lalandia. dk

## Atlantsflog

Flogfelagið Atlantsflog er blivin ein stoltleiki hjá føroyingum. Felagið varð stovnað fyri at fáa kapping á Føroyarutuni, men felagið bleiv nógv meira enn bara ein kappingarneyti hjá Maersk. Atlantsflog gjørdist flogfelagið hjá føroyingum, og so væl hevur tað gingið hesi árini, at felagið seinastu tíðina hevur einsamalt røkt flogvegis sambandið hjá føroyingum út í heim.

Tað vóru nógv, sum ivaðust í, um felagnum varð lív lagað, tá ið tað varð stovnað í 1988. Men søgan hevur prógvað, at Atlantsflog, sum setti Føroyar í miðdepilin, hevur tænt føroyingum bæði væl og virðiliga. So væl, at felagið síðan hevur keypt fleiri flogfør av sama slagi fyri at nøkta eftirspurningin, sum er nógv øktur, so hvørt Atlantsflog hevur økt um flogleiðirnar til at fevna um øll grannalondini.



Atlantsflog byrjaði við einum flogfari, men hevur nú fimm flogfør í flotanum. Hesi flogfør røkja sambondini til Danmarkar, Ísland, Bretlands og hini støðini, har føroyska flogfelagið flýgur til.

Atlantsflog er meira enn bara flogfør, tí á ferðaskrivstovuni hjá Atlantsflog ber til at keypa pakkaferðir ella fáa sett saman sín egna ferðapakka út í heim.

Lesa meira um Atlantsflog og teirra útboð á www. atlantic.fo